# Sølufólk til Atlantic Airways í Danmark

**Atlantic Airways sóknast eftir einum sølufólki til deildina í Kastrup.**

Atlantic Airways er eitt flogfelag í støðugum vøkstri, og fær søludeildin tískil alsamt meira at gera. Soleiðis skalt tú vera við til at avgreiða ein alsamt vaksandi viðskiftaskara í Danmark.

Tú ert fyrikomandi og dugir væl at fara við fólki. Tað er ein fyrimunur, um tú dugir at brúka Amadeus og vanligu telduforritini og dugir væl danskt og klárar teg á enskum.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi og eru eisini sunnu- og halgidagar.

Av tí at arbeiðsstaðið er í Danmark, er neyðugt, at tú býrt ella fært tær bústað í Danmark.

Send okkum eina umsókn við prógvum og viðmælum. Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 26. august, og starvið verður sett skjótast gjørligt.

Lønin verður eftir avtalu.

Upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Kent Christensen á tlf. 34 10 40.

Atlantic Airways
Sølu- og Marknaðardeildin
FO-380 Sørvágur

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2815, Sp/f Green, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 11.07.2001.
Kapitalur:
Hækking við kr. 20.000,00 til kr. 100.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 20.000,00 við skuldarumskifti til kurs 1439,27

Skráseting Føroya tann 15. august 2001

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 151, P/F Fiskaaling, 430 Hvalvík.

Nevnd:
Farin frá sum formaður: Kjartan Hoydal, Reynagøta 23, 100 Tórshavn.
Innkomin sum formaður: Janet Fríða Johannesen, Niðaragøta 74, 188 Hoyvík.

Skráseting Føroya tann 15. august 2001

Kristin Balle

---

SKEIÐSDEPILIN Á LANGASANDI
*The Course Centre at Langasandur*

# Skeiðsrøðir 2001–2002

Í tíðarskeiðnum september 2001 til mars/apríl 2002 verða hesi skeið hildin, treytað av, at talið á luttakarum verður 8-10.

**ENSKT**
- **Enskt lágstig (KET) - 6 vikuskifti**
- **Enskt framhaldsskeið (PET) - 6 vikuskifti**
- **Enskt hástig (FCE) - 6 miðvikur**
- **Enskt í frálandavinnuni - 2 modul, 4 dagar hvørt**
- **Enskt í ferðavinnuni - 3 seminar, 4 dagar hvørt**

**FØROYSKT**
- **Føroyskt fyri øll - 6 vikuskifti**
- **Føroyskt í fyri-og umsiting - 6 miðvikur**
- **Faroese for non-Nordic Speakers - 6 vikuskifti**

**ONNUR SKEIÐ**
- **Hvussu menna vit smávirki og -fyritøkur á bestan hátt - 2 støk seminar**
- **Ferðavinna í alheimshøpi - 2 seminar, 2 vikuskifti**
- **Tvørmentanaligt samskifti - 2 seminar, 4 dagar hvørt**

**Tilmelding innan 3 september.**

Upplýsingar fáast við at venda sær til avgreiðsluna, tlf. 42 25 74, ella á heimasíðu okkara, www.depilin.fo, har tilmelding eisini kann gerast.

**SKEIÐSDEPILIN**
438 Langasandur
Tlf. 42 25 74
www.depilin.fo

# Eysturskúlin

Søkt verður eftir lærara til tíðaravmarkað starv skúlaárið 2001/02 at undirvísa 12 timar um vikuna í ítrótti.

Umsóknir, stílaðar til Skúlastýrið fyri Eysturskúlan skulu sendast skúlanum í seinasta lagi mánadagn 20. august 2001.

**Skúlastýrið fyri Eysturskúlan**

# Venjingarskúlin

Søkt verður eftir lærara til tíðaravmarkað starv skúlaárið 2001/02 at undirvísa 12 tímar um vikuna í ítrótti.

Umsóknir, stílaðar til Skúlastýrið fyri Venjingarskúlan skulu sendast skúlanum í seinasta lagi mánadagin 20. august 2001.

**Skúlastýrið fyri Venjingarskúlan**

# Leyst starv

Varðaleiðari til handilin í Vágum søkist at seta skjótast gjørligt, ella eftir nærri avtalu.

Uppgávurnar eru:
- At halda handilin á einum høgum støði.
- Dagligu ábyrgdina av einum nøktandi handli hjá viðskiftafólkinum.
- Avloysari hjá deildarleiðaranum.
- Eisini eru møguleikar fyri framtíðar avbjóðingum.
- At royna evni og hugflog í einum spennandi umhvørvi.

Løn sambært avtalu.

Áhugað kunnu venda sær til Álv Samuelsen, deildarleiðara, tlf. 332950.
Umsóknarfreistin er **30. august 2001**.

Skrivlig umsókn skal sendast til

**FK Vágar**
370 Miðvágur
att.: Álvur Samuelsen
Keypssamtøkan í Vágum

# Summarfrí

Stongt er til 27.08.01.

**Kliniskur tannteknikari**
**BERGUR**
**Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík, Tlf. 448480

# Avloysari

Søkt verður eftir einum fryntligum, fyrikomandi og røskum fólki at byrja skjótast gjørligt.

Skiftandi vaktir.

Løn eftir avtalu.

**Havnar Bio**
Tlf. 311956



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2229, P/F Kósin, 700 Klaksvík.

Nevnd:
Farin úr nevndini: John Rajani, Áarrás 7, 160 Argir og Constanca Óla Gloria Kalsø, Marknagilsvegur 103, 100 Tórshavn.
Farin frá sum formaður: Kristian Meinhard Eliasen, Millum Gilja 135, 188 Hoyvík.
Innkomin í nevndina: Hanus Hansen, Undir Brúnni 22, 700 Klaksvík (formaður) og Adrian Dalsá, Grannatún, 600 Saltangará.

Skráseting Føroya tann 15. august 2001

Kristin Balle

---

ELEKTRON

# Systemforritari til Elektron

Við tað at størri dagføringar standa fyri framman, sóknast vit eftir einum fólki at starvast í Systemdeildini, ið hevur ábyrgdina av grundleggjandi telduumhvørvinum, netbygnaði og stýrisskipanum á meginteldu- og miðspjadda økinum. Tú kemur serliga at arbeiða á megintelduøkinum, har uppgávurnar m.a. eru:

- Leggja ætlanir fyri dagføring og útbygging av meginteldunum við hartil hoyrandi útbúnaði og stýrisskipanum
- Nároynd og leggja til rættis produktión og verksetan av produktiónsumhvørvi
- Veita bráðfeingishjálp, stuðul og ráðgeving til aðrar deildir
- Rætta feilir, optimering av meginteldunum til tess at halda eitt trygt grundumhvørvi

Vit vænta
at tú hevur hegni til telduarbeiði á tekniskum stigi, kunnleika til og royndir við stórteldum, og at tú setur teg skjótt inn í nýggjar skipanir og avbjóðingar.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur eina tekniska útbúgving og royndir við systemarbeiði við einum ella fleiri av hesum økjum: MVS/OS/390, JES2, VTAM, TSO, CA90's, RMM, DKMS, Beta, IMS, DB2, CICS o.l.

Tú mást duga at arbeiða sjálvstøðugt og í bólki. Tú mást sum persónur klára at hava fleiri bóltar í luftini í senn og vera fyrireikaður uppá, at viðhvørt er neyðugt at arbeiða undir ávísum trýsti.

Vit bjóða
- Eitt spennandi og avbjóðandi starv við dugnaligum og beinasomum starvsfeløgum
- Góðar útbúgvingarmøguleikar
- Løn eftir førleika

Um tú vil vita meira
ert tú vælkomin at seta teg í samband við Óla Simonsen, deildarleiðara, á telefon 31 45 05 ella á telduposti oli@elektron.fo.

Umsóknir skulu stílast til Óla Simonsen,
P/F Elektron, Staravegur 9,
Postboks 3219, 110 Tórshavn

P/F Elektron er edv-veitari til almennar stovnar, peningastovnar, tryggingar og grunnar. Vit veita nærum allar tænastur innan edv til kundar okkara, herímillum kanningar av ymiskum tekniskum og handilsligum viðurskiftum, skipanarmenning og rakstur av edv-skipanum.

Størstu partaeigararnir eru Føroya Banki, Føroya Sparikassi og Føroya Landsstýri.

**P/F ELEKTRON**
STARAVEGUR 9 · P.O. BOX 3219
FO - 110 TÓRSHAVN
TEL.: +298 314505 - FAX: +298 316384

stephanssons hús

**Norðurlandahúsið í Føroyum**

*Sí SVF tekstvarp s. 650*

# Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

Limafundur verður 20. august kl. 20.00 í hølunum á Áarvegnum.

Skrá: Landsfundurin.
Uppskot um val av starvsnevndar- og floksleiðsluumboðum.

**Nevndin**



# Handverkari søkist

Søkt verður eftir dugnaligum handverkarum at arbeiða innan HVS og smiðjuyrkið

demich
**Stiðjagøta 2 - Postboks 378**
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 31 10 71
Telefax +298 31 04 60
e-mail: demich@demich.fo

# Hjálparfólk/Avloysara

Søkt verður eftir einum hjálparfólki at arbeiða 24 tímar um vikuna.

Barnsburðaravloysara fyri pedagog 30 tímar um vikuna í 4 mánaðir.

Vit søkja eisini eftir einum sjúkravikari.

Lønar- og setanarviðurskiftir verða fyribils sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið, lønt í lønarflokki 11.

Barnagarðurin er ein sjálvsognarstovnur, hvørs endamál er at hava umsorgan fyri børnum í aldrinum 0 til 7 ár og á einum kristnum støði at menna tey í tryggum viðurskiftum á uppalingarligan fullgóðan hátt.

Vit vænta, at tú saman við okkum, skapar eitt gott umhvørvi á stovninum.

Meira fæst at vita við at tosa við leiðaran á tlf. 455557.

Umsóknirnar skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. september 2001.

**Dr. Margrethu Barnagarður**
**Gerðagøta**
**Fo-700 Klaksvík**

# Sosialurin
www.sosialurin.fo




**pf Maria Poulsen**
8 - 1 000

Sosialurin 311820